GJALDSTOVAN

**Síðsti dagur bókað verður á fíggjarárið 2024**

Stovnarnir verða mintir á, at fríggjadagin 21. februar 2025 er seinasti dagur, ið stovnar kunnu bóka kreditorskjøl á fíggjarárið 2024, og seinasta lønarkoyringin fyri fíggjarárið 2024 verður fríggjadagin 14. februar 2025.

Neyðugt er tí, at lønarskjøl viðvíkjandi fíggjarárinum 2024 eru Gjaldstovuni í hendi at avgreiða í seinasta lagi fríggjadag 14. februar 2025. Kreditorskjøl viðvíkjandi fíggjarárinum 2024 skulu somuleiðis vera Gjaldstovuni í hendi fríggjadag 14. februar 2025. Sama dag verður debitormodulið fyri 2024 stongt, so stovnarnir hava møguleika at avgreiða tær rokningar, tey hava móttikið.

Gjaldstovan fer, regluliga, fram til 21. februar 2025 at minna á hesa freist.

Undir "Ársroknskapurin 2024" liggur t.d. skjalið "Tíðaravmarkan av útreiðslum í ársroknskapinum 2024", sum hevur áhuga hjá teimum, ið vita, at ein útreiðsla skal bókast á 2024, men rokningin er ikki stovninum í hendi fyri 16. februar 2025.